MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Trivnaðarnevndin

Løgtingið
100 Tórshavn

Tórshavn 22.10.2020
J. nr.
Viðgjørt
Tykkara j. nr.

Uni Rasmussen, formaður
Sirið Stenberg, næstformaður
Rósa Samuelsen
Erhard Joensen
Aksel V. Johannesen
Hervør Pálsdóttir
Jóhan Eli Poulsen

Trivnaðarnevnd Løgtingsins innkallaði umboð fyri MEGD til fundar týsdagin 20. oktober 2020 kl. 09.30 saman við umboðum fyri Sinnisbata, Javna og Diabetesfelagið í sambandi við nevndarviðgerð av fylgjandi løgtingslógum:

- Løgtingsmáli nr. 31/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.)

- Løgtingsmáli nr. 32/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Arbeiðsgevarapartur longdur)

- Løgtingsmáli nr. 33/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a (Lestrarstuðul frádrigin í fyritíðarpensjón)

- Løgtingsmáli nr. 34/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar (Útsetan av javning)

- Løgtingsmáli nr. 37/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Eftirbataheim verður strikað, hækking av heilsutrygdargjaldi úr 0,60% til 0,70%, broyting av tilskotsstiganum og broyting um hjálparráð)

MEGD hevur hesar viðmerkingar:

Løgtingsmál nr. 31/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um **arbeiðsfremjandi tiltøk** (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.)

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Orsøkin til uppskotið er liður í ætlanini hjá landsstýrinum at tálma útreiðslunum á fíggjarlógini fyri 2021. Sagt er, at útreiðslurnar til tillagað starv eru øktar seinastu árini (14 mió. um árið). MEGD spyr, um Trivnaðarnevndin veit, hvussu hendan upphædd stendur mát til, at færri í dag fáa lægstu og miðal pensjón? Og tað, at tey flestu, sum fáa fyritíðarpensjón, fáa hægstu fyritíðarpensjón?

MEGD hevur merkt, at mong eru glað fyri skipanina. Torført er at broyta tað, sum virkar, og samstundis at fáa tað sama, tá ið grundgevingin er, at tað verður spart. Her verða fleiri skerd í upphædd. Á arbeiðsmarknaðinum er tað sáttmálaløn, sum er lykilin. Tað er tað eisini í hesi broytingini. Arbeiðsgevarin rindar sáttmálaløn, og Almannaverkið eitt lægri ískoyti.

MEGD sær hetta sum at missa vunnin rættindi. Í einum samfelag, har lønir alsamt hækka og vørur gerast dýrari, er skjótt ikki at kunna fylgja við.

Løgtingsmál nr. 32/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Arbeiðsgevarapartur longdur)

MEGD metir, at av tí at uppskotið leggur upp til, at arbeiðsgevarin rindar fyri fleiri dagar vegna sjúku, og arbeiðsgevaraparturin harvið gerst hægri, kunnu fylgjurnar verða, at arbeiðsmarknaðurin gerst meira afturlatin við, at færri arbeiðsgevarar bjóða arbeiðspláss fram.

Hetta eigur at verða tikið við, so tryggjað verður, at færri tilboð ikki vera úrslitið av lógarbroytingini.

Løgtingsmáli nr. 33/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a (Lestrarstuðul frádrigin í fyritíðarpensjón)

MEGD metir, at myndugleikin eigur at hugsa um, at lesandi, ið ikki liva við avbjóðingum, lættari kunnu arbeiða eftir skúlatíð og vinna eitt sindur av peningi afturat lestrarstuðlinum. Í fleiri førum hava lesandi, ið liva ið avbjóðingum, ikki orku at arbeiða afturat lestrinum.

Løgtingsmáli nr. 34/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar (Útsetan av javning).

MEGD vil fyrst vísa á, at tað er óheppið ikki at fylgja einum samdum løgtingi, sum í 2018 samtykti at javna almennaveitingar í 2021. Vitandi um, at tað ikki er blivið javnað seinastu árini, so er tað ein avgjørd avbjóðing, at Føroya Løgting vil broyta

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

tað, sum er samtykt í undanfarnari tingsetu. Hetta vísir manglandi vilja at gera langtíðar avtalur og ætlanir. Sambært lógaruppskotinum hjá landsstýriskvinnuni skal lógarfesta javningin útsetast til 2022 og ikki í 2021, sum samtykt.

Sparingin er ikki stór. Hálv tíggjunda mió.

MEGD leggur upp til, at tað verður javnað, sum samtykt var í 2018, at javnast skuldi 1. januar 2021. Ongin javning hevur verið síðani 2014. Tá tað ikki hevur verið javnað í fleiri á, meðan lønir annars eru hækkaðar og dýrari er at liva, fáa vit nøkur, ið samanborið við onnur, gerast fátækari.

MEGD heitir á myndugleikan um ikki at útseta javningina. Fyri fólk hava hesir pengarnir týdning, og fyri landskassan er hendan sparingin lítil.

Løgtingsmáli nr. 37/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Eftirbataheim verður strikað, hækking av heilsutrygdargjaldi úr 0,60% til 0,70%, broyting av tilskotsstiganum og broyting um hjálparráð).

MEGD hevur 30.09.2020 sent soljóðandi skriv til Kaj Leo Holm Johannesen og Heilsumálaráðið:

MEGD undrast á hesa orðing: 1.5. Ummæli og ummælisskjal. Av tí at hetta uppskotið hevur sera stóran skund, hevur tað ikki verið til hoyringar hjá viðkomandi hoyringspørtum.

MEGD vil gera vart við sína ónøgd, at MEGD og limafeløgini ikki hava fingið hetta lógaruppskotið til hoyringar, tá tað fer at hava avleiðingar fyri okkara limir.

MEGD tekur ikki undir við, at tilskotsstigin verður broyttur, soleiðis at lívsneyðugur heilivágur verður dýrari. Og at heiliráð eisini verður dýrari sambært uppskotinum: § 10, stk. 6 Ískoyti verður veitt til gjald fyri hjálparráð, sum skal nýtast í sambandi við heilivág t.d. insulinsproytur ella inhalatorar til astmaheilivág.

Lógarbroytingin verður gjørd fyri at útvega landskassanum hægri inntøkur, har útrokningin sigur, at landskassin fær 11,5 mill.

Samstundis skal setast ein Hjálparráðsnevnd. MEGD saknar eina útrokning fyri øktar útreiðslur yvir, hvat hetta kemur at kosta samlað fyri Heilsutrygd, sum skal veita skrivara, møguliga fleiri starvsfólk til Kærunevndina í Almanna- og, familju og heilsumálum at umsita kærur, umboð fyri Heilsuverkið, øktar KT útreiðslur hjá Apoteksverkinum og læknaligu serfrøðini í nevndini.

MEGD undrast á, at ST sáttmálin ikki er nevndur í hesum sambandi:

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

2.7. Millumtjóða sáttmálar á økinum Ongir.
2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar. Ongir.

MEGD undrast harafturat á 2.17 Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, at NEI er sett inn í kassan *Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar og felagsskapir*. MEGD vil minna á, at uppskotið hevur avleiðingar fyri limirnar í MEGD.

MEGD vil staðiliga heita á myndugleikarnar, tá lógir verða smíðaðar, at tær taka støði í ST sáttmálanum, sum landsstýrið hevur ratifiserað. Hetta er galdandi fyri allar fimm lógirnar.

MEGD vil minna á grein 25, a og e:

a. útvega fólki, sum bera brek, sama útboð, góðsku og støði av ókeypis ella ódýrari heilsurøkt og heilsuskipanum, sum verða veitt øðrum fólkum

e. banna mismun ímóti fólki, sum ber brek, í sambandi við heilsutrygging.

Vinaliga fyri MEGD

Tóra við Keldu, forkvinna Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo